# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Petur Sofus Juul úr Funningi

**f. 25. september 1929 · d. 28. mars 2006**



Ikki vardi tað meg, at farvælheilsanin í vár skuldi verða okkara seinasta. Og ikki bar mær til at koma heim og fylgja honum.

Petur og eg vóru systkinabørn, og av okkum systkjunum var eg tann hepna at eiga hann sum gubba. Men hvussu var og ikki, hann bleiv Petur gubbi hjá okkum øllum. Hann var okkum so góður! Tá ið vit vóru børn, var hann »stóri beiggin«, sum uggaði og hjálpti, tá ið okkurt bagdi, og hevði tinganest við til okkara. Jú, víst var frøi á barnaflokkinum frammi á Hellu, tá ið Petur gubbi var komin aftur av skipi.

Seinni, tá ið vit vóru tilkomin, varð Petur vinurin, sum fylgdi væl við, hvussu tað gekst systkinabørnunum og teirra. Kanska var eg í serstøðu sum guddóttirin á flatlondum, men eg tori at siga, at eingin var við sviðusoð. Tað var soleiðis við Peturi, at hóast hann fekk sína egnu familju at varða av og fjálga um, varð nóg mikið eftir til okkara við. Tað var rúmsátt í hjarta hansara.

Tá ið ein vitjaði aftur á klettarnar, og Petur læt upp hurðina og beyð vælkomin heim, blíður og hjartaligaur, tá var ein rættiliga heima aftur. Góðar vóru løturnar, tá hann vitjaði, tíðum skemtiligar og altíð hugnaligar, tí hann bar tað við sær sjálvur.

Og áhugavert var at sita undir, tá ið hann segði frá farnum bygdalívi og skyldfólki, sum vit, ið yngri vóru, ikki kundu minnast.

Nú harmar tað meg, at vit ikki spurdu meira, tí har var vitan at heinta. Tá ið farið varð avstað aftur, plagdi ein vælbjálvaður pakki við onkrum góðum serføroyskum at vera í viðførinum, og gevarin var vísur!

Tað verður undarligt at koma aftur heim at ferðast og eingin Petur. Men kenni eg sakn, hvussu mikið meira manst tú ikki kenna tað góða Henny og tit børn og barnabørn! Í huganum fylgdist eg við tykkum tann dagin út á kirkjugarðin. Jesus veri hjá tykkum og hann styrki tykkum øll!

Ærað verið minnið um Petur gubba.

**Sólvá**

## Andlát og jarðarferðir

**Thorvald Poulsen, Tvøroyri**, vanliga nevndur **Thorvald úr Øravík**, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum 11. juni, 84 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Jensina Magnussen úr Streymnesi** andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin, 95 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum týskvøldið kl. 18 norð í Hvalvíkar kirkju. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið ynskja at minnast Jensinu, kunnu lata eini gávu til Hvalvíkar Missiónshús; konta í peningastovnunum.

**Jóhanna Olsen ættað úr Oyndafirði**, búsitandi í Havnsø Danmark, andaðist leygardagin, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Stig Bjergby kirkju hósdagin kl. 13.

**Jonhard Vang Jacobsen úr Syðrugøtu** andaðist á Ríkissjúkrahúsinum leygardagin, 70 ára gamal. Bønarhald verður í kapellinum á Ríkissjúkrahúsinum í dag kl. 13. Kistan kemur við flogfari í morgin umleið kl. 14. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

---

Kunngjørt verður fyri ætt,vinum og kenningum, at góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jensina Magnussen**

Streymnes

Andaðist á Landssjúkrahúsinum 10. juni,
95 ára gomul.
Kistan fer úr kapellinum týskvøldið kl. 18.00,
norð í Hvalvíkar kirkju.
Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14.00.
Sálmabókin verður nýtt.

*Familjunnar vegna*
**Dávur Emil, Kirstin, Steingrím og Jóna**

Tey, ið ynskja at minnast Jensinu, kunnu lata eina gávu til Hvalvíkar Missiónshús. Konta í peningastovnunum.

---

## Tríggir nýggir kolvetnisverkfrøðingar

Fríggjadagin 9. juni 2006 fingu tríggir studentar á Fróðskaparsetrinum handað bachelorprógv sum kolvetnisverkfrøðingar. Síðani útbúgvingin fór í gongd á heysti 1998 hava tilsamans 11 studentar fingið bachelorprógv sum kolvetnisverkfrøðingar.

Bachelorútbúgvingin í kolvetnisverkfrøði hjá hesum studentunum hevur fevnt um trý og eitt hálvt ára fulltíðar lestur. Umframt grundgreinir innan støddfrøði, alisfrøði, ravmagnsfrøði og teldufrøði hava studentarnir eisini lisið ymsar sergreinir innan kolvetni. Harumframt hava studentarnir gjørt eina bachelorverkætlan við sjálvvaldum verkevni.



*Teir nýklæktu kolvetnisverkfrøðingarnir eru f.v. Olgar Danielsen, Bjarni Petersen og Fríðrik Heinesen*

### Dagurin í morgin

**13. juni. Kyrillos.** Fleiri halgimenni eru við hesum navni, helst er her talan um ein biskup í Aleksandria, sum doyði í 444 . Erlendur biskupur doyði hendan dagin í 1308.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir